VIÐMERKINGAR

# Ongan stoltleika

**Óluva Húsgarð**
*Í Havn, hin 28. mai 2005*

Í Dimmalætting hin 26. mai stendur »Opið bræv til løgmann« frá Musikklærarafelag Føroya, ið mótmælir, at hægsti myndugleiki í Føroyum brúkar útlendskar tónleikarar at umboða almennu Føroyar á almennu kongaligu vitjanini í summar.

Takki Musikklærarafelagnum fyri, at tað letur við seg koma, og at tað mótmælir.

At embætisfólk á løgmansskrivstovuni ikki duga á at skyna, at soleiðis ber mentað fólk seg ikki at, kemst av, at tvey ættarlið hava livað og virkað undir heimastýrislógini, har grein 11, 1. stk. er líka fúlt, sum tiltikna grein 7 í lógini um barnaskúlan.

Í grein 11, 1. stk. í heimastýrislógini stendur: **»Føroyskt verður viðurkent sum høvuðsmál, men danskt skal lærast væl og virðiliga, og danskt kann eins væl og føroyskt nýtast í almennum viðurskiftum«.**

Heimastýrisflokkarnir, sum samtyktu hesar reglur, vágaðu sær ikki at nýta tær, meðan teir sótu í landsstýrinum frá 1948-1950, frá 1958-1962 og frá 1966-1970.

Í 1970 kom eitt nýtt ættarlið upp í føroyskan politikk. Hetta ættarlið hevði livað í gleðirúsi í »glaðu 60-unum« í Danmark og fekk nú fótin inn um tinggátta og landsfyrisitingina við einum sterkum landskassa. Hesir vóru »verðinsmenn« og ikki sum »føroysku heimføðingarnir«, sum høvdu bygt landskassan upp, og sum rindaðu hvørjum sítt! Teir, ið komu aftaná hesar, og sum komu í fullveldislandsstýrið 2000-2004, settu útlendingar, sum ikki duga føroyskt, í landsins hægstu sessir fyri almenna føroyska løn eftir útlendskum taksti, og settu hesar framum okkara egnu við hægstu útbúgving.

**Hetta hevði ikki gingið í Danmark!!**

Sitandi landsstýri talar um nýggjan sáttmála, sum gevur líkarætt millum londini Danmark-Føroyar.

Líkarættur er ongin, so longi sum grein 11, 1. stk. í »Lov om Færøernes Hjemmestyre« er í gildi, og hana tykjast menn ikki vera førir fyri at taka av!

At útlendskir tónleikarar nú fara at umboða almennu Føroyar á almennu kongaligu vitjanini er bert ein avleggari av heimastýrislógini.

# Atlantic Airways regatta 2005

FELAGIÐ NEYSTIÐ

Nú er regattaðin av fyri hesu fer og ynskir Neysti við hesum orðum at takka teim, ið hava uppiborið eina slíka.

Sum vanligt luttóku føroyingar í rógvingini og var tað ein stór gleði, at vísa dønum og øðrum uttan fyri føðilandi, hvat kappróður er, tá hann er best.

Ein tíðindakvinna var har og spurgdi "hvussu ber tað til at føroyingar duga so væl at rógva?". Svara varð "tað er tí, at ein føroyingur er føddur við ár í hond" - sigast skal, at henda tíðindakvinna var við barn- tá hon hoyrdi svarið, suffaði hon og segði "godt jeg ikke skal føde er færing ham", hartil varð svara " -slap af færinger er selvfølgelig født ved kejsersnit".

Aftaná eitt fríggjakvøld við Guðrun á skránni og eina væleydnaða ferniseringing leygardag á miðdegi, hvar ikki minnst husakórið setti dám á løtuna, setti Lars Lykke Rasmussen innanríkismálaraðharrin stevnuna. Hann kundi ikki hava føroysku frúuna við - sum hann tók til "nogen skal jo passe arbejdet". Ein vælfyrireika røða varð hildin. Sera "atletisk" kom hann runt um loysingarspurningin, hann samanlíknaði við kjalavatni aftan á ein bát, tá báturin rør endar kjalarvatni, og er sum ein eind aftur. Soleiðis eisini við felagsskapunum millum Føroyar og Danmark, vit kunnu ikki liva sum fráskilt hjún, fyri tað kann einkarrætturin vera, sum hann er.

Neystið bjóðaði turra grind, spik og turran fisk og sást tað skilliga, at ráharrin dámdi alt sera væl- tað skuldi kanska bara mangla, tá hann er føroyskt giftur.

Kappróðurin, sum ikki hevur tann stórleika, sum vit kenna fra òlavsøku heima, var lokalt útvarpaður, og var tað Magni Arge stjóri, sum stóð fyri hesum. Kanska var rógvingin ikki sum á ólavsøku, men tit skulu vita, at útvarpingin stóð ikki aftan fyri olavsøkuni heima, tað var einastandandi, og skal Magni hava stóra takk. Ikki eydnaðust okkum at takka honum, sum hann hevði uppiborðið, hann skuldi skunda sær víðari út í stóru verð, sum ein lambamaður einaferð segði undir einari millumlending i Bretlandi "I am a business man from Lamba".

Kappróðurin var skjótt avrikaður, og vunnu havnarmenn tað rógving teir skuldu. Tað norðurlanda róðurin, men grønlendingar mundi tikið allir á bóli, bert ein føroyskur vilji og treiskheit gjørdi, at sigurin var føroyskur.

Vit í neystinum taka húgvuna av fyri manningini á 10 mannafarinum Tvørábátinum, fyri fyrstu ferð smurdu teir 10 mannafarið hjá neystinum av, tann báturin er tann Vágbingur, sum í 1980 varð føroyameistari, tillukku til vinnararnar, hvar tó fleiri teirra hava fingið lærdom við at rógva við Vagbingi.

Um kvøldi spældi Frændir fyri fullum telti og vóru tað góðir tímar fyri teim, sum dansaðu og sungu við.

At enda enn einaferð stora takk fyri góðan stuðul heimanifrá, vit mugu eisini nevna ta traditión, sum okkara kæru gestir frá Havn hava innført. Kl. 19 møtast vit øll í teirru smáttum, og har hava teir so fyrireika mat, sum upplivast má - tí eingin kann siga fra tí.

Nú hava vit frið eina tíð, men 29 juli er ólavsøka á Bryggjuni, tá verður aftur nakað at fara til.

# Country- og dansitónleikur við West & Blus í Ítróttarhøllini á Hálsi

**Leygarkvøldið 18. juni spælir vælumtókti country- og dansibólkurin West & Blus í Ítróttarhøllini á Hálsi**

DANSUR
*Tíðindaskriv*

Bólkurin West & Blus varð stovnaður í 1993 í Esbjerg, men kortini eru tríggir av manningini føroyingar, meðan fjórði limurin er dani.

Teir, ið manna bólkin, eru Hallur Joensen, ið annars er beiggi Noel Joensen, ið nógv munnu kenna sum oddamann í Countrybólkinum úr Klaksvík; systursonur Hall, Rúni Heinesen, somuleiðis úr Klaksvík; Eiler Østerø av Skipanesi; og Jens Kristian Nielsen, ið er dani. Teir eru allir búsitandi í Danmark.

Steel-guitarin sum er dani, fekk ikki stundir at koma til Føroyar, og í hansara stað er komin tann vælkendi steel-guitarin Milson Zachariassen, sum øll tónleikaáhugað í Føroyum kenna.

Allir høvdu spælt tónleik áðrenn teir hittust í West & Blus

Hallur Joensen hevði verið nógv á palli, áðrenn hann í áttatiárunum flutti til Danmarkar, eitt nú við Frændum, Haiko og Vágsheygafrensunum. Eisini hevur hann vunnið kappingina Ársins songrødd, eins og hann gjørdist nr. 2 í tónleikakapping, sum danska blaðið SE & Hør skipaði fyri.

Men eisini hinir limirnir høvdu roynt seg áðrenn. Í 70'árunum spældi Eiler Østerø í bólkinum Cosmus Factory, sum helt til í Runavík, meðan Rúni Heinesen, sum yngri, spældi saman við ymiskum ungum í Klaksvík. Stílurin var mest Heavy og Gospel.

Danin Jens Kristian Nielsen hevur spælt tónleik í nógv ár. Hann byrjaði við at spæla harmoniku, men skjótt gjørdist tað trummurnar, sum honum dámdi best. Hann hevur í nógv ár spælt til tað, sum danir rópa "suppe, steg og is" veitslur.

## Spæla til nógv tiltøk í Danmark

West & Blus spælir á nógvum Countrytiltøkum í Danmark. Eisini eru teir væl umtóktir á teimum føroysku veitslunum hjá føroyingafeløgunum í Danmark eins og teir eisini spæla til brúdleyp, føðingardagar, býfestir og ítróttarstevnur. Í 2006 er teir bidnir at spæla til eina landsstevnu, sum DGI (Danske Gymnastik- og Idrætsforeninger) heldur í Haderslev frá 29. juni til 2. juli. Á landsstevnuni verður luttikið í 20 ymiskum greinum og pláss er fyri umleið 23.000 íðkarum.

West & Blus spældu bæði á Norðoyarstevnu í fjør eins og teir eisini vóru á Norðoyastevnupallinum í ár. Og leygarkvøldið fáa Country áhugað høvi at svinga til frálíka country- og dansitónleikin hjá West & Blus í ítróttarhøllini á Hálsi.

# Konsertir við TRISFO

**Bólkurin TRISFO, sum er samansettur av tónleikarum úr Føroyum og Íslandi, byrjaði fyri trimum árum síðani, og hava teir fleiri ferðir verið á konsertferð í Norðurlondum**

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Sigurður Flosason hevur síðan fyrst í áttati-árunum verði mest brúkti saxofonleikarin í Íslandi og er hann at finna á óteljandi íslendskum innspælingum, umframt at hann hevur givið nógvar fløgur út í egnum navni.

Sigurður er ein tónleikari sum ferðast innan nógv tónleikasløg, og hevur hann tí ein sera víttfevnandi stíl at byggja sítt spæl á. Hetta kemur teimum tilgóðar í TRISFO, har tónleikurin er nógv merktur av hvørjum einkultum tónleikara.

Kjartan Valdemarsson er eisini ein av teimum fremstu tónleikarunum í Íslandi, og hevur hann eisini verið at finna í mongum íslendskum bólkum, bæði innan rock og jazz. Fyriuttan at verða ein dugnaligur klaverspælari, er Kjartan eisini kendur fyri sínar tilrættleggjingar fyri orkestur. Seinast hava vit her í Føroyum á konsert í Norðurlandahúsinum, hoyrt tilrættaleggjingarnar hann hevði gjørt til Eivør Pálsdóttir og íslendska KASA-hópin,.

Edvard Nyholm Debess hevur nú í áravís verðið ein av teim føroysku tónleikarunum sum hava lita okkum tónleikalívið.

Hetta hevur hann í stóran mun gjørt við sínum kontrabasspæli, men hevur hann eisini lagt tilrættis fleiri minniríkar konsertir og tónleikatiltøk. Fyriuttan at hava spælt við flestu føroysku tónleikarum, hevur Edvard eisini spælt saman við mongum útlendskum tónleikarum, bæði her og úti í heimi.

TRISFO er ein av norðurlendsku samstarvunum hann er við í.

TRISFO spælir tríggjar konsertir á Summartónum í ár, og kunnu fólk vænta sær fjølbroyttan jazztónleik, har samanspælið millum teir tríggjar er tað sum berir tónleikin..

Bólkurin TRISFO hevur fingið sera góð viðmæli har hann hevur spælt, og fara teir eisini at spæla inn fløgu meðan teir eru í Føroyum.

### Manningin er:

Sigurður Flosason, saxofon
Kjartan Valdemarsson, klaver
Edvard Nyholm Debess, kontrabass.

### Konsertirnar verða í :

REX, Tórshavn
Hóskvøld 16.06, kl.21.00

Klæmintsgjógv (Norðlýsið)
Fríggjadag 17.06, kl. 17.00 - 23.00

Havnar Kirkju
Leygardag 18.06, kl.11.30